# Ísrael fyrireikar innrás í Gaza



*Tað seinasta samdøgrið hevur Ísrael flutt herfólk og stríðsvognar til markið við Gaza*

**Ísraelska stjórnin er til reiðar at brúka øll vápn, eftir at víðgongdir palestinar hava burturflutt ein særdan ísraelskan hermann**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska stjórnin sat á kreppufundi í gjárkvøldið og umrøddi støðuna, eftir at víðgongdir palestinar høvdu kunngjørt, at teir høvdu tikið ein særdan ísraelskan hermann.

– Vit fara at svara hesum álopinum á ein hátt, sum skal fáa mótpartin at skilja, at slíkt hevur avleiðingar, og vit eru til reiðar at brúka alla okkara megi, segði Amir Peretz, verjumálaráðharri, aftan á fundin.

Hetta er fyrstu ferð síðani 1994, at palestinar hava megnað at burturflyta ein ísraelskan hermann. Ísraelska herleiðslan váttaði í gjár, at tann 19 ára gamli Gilad Shalit var burturfluttur. Herleiðslan legði afturat, at Mahmoud Abbas, forseti, og Hamas-stjórnin hava ábyrgdina av lívi og heilsu hansara.

Eygleiðarar í Miðeystri siga, at ósemja er í Hamas um burturflytingina. Tann hernaðarligi vongurin segði seg fegnast um avrikið hjá sínum limum, men tann politiski vongurin fanst at burturflytingini.

Ísraelska fregnartænastan heldur, at tað var Hamas-deildin í Damaskus, sum skipaði fyri burturflytingini, og at endamálið er at órógva samráðingarnar millum Hamas-stjórnina og Mahmoud Abbas, forseta.

Fleiri royndir verða gjørdar at forða fyri, at Ísrael skal gera innrás í Gaza. Egyptaland hevur sent diplomatar til Gaza at royna at fáa tann ísraelska hermannin leysan, og ísraelski uttanríkisráðharrin, Tzippi Livni, hevur tosað við ST-aðalskrivaran, Kofi Annan, amerikanska uttanríkisráðharran, Condoleezza Rice, og fleiri evropeiskar uttanríkisráðharrar um støðuna.

Tíðindastovurnar skriva, at burturflytingin var sera væl løgd til rættis. Burturflytararnir komu ígjøgnum ein 300 metrar langan tunnil, sum endaði beint í einari ísraelskari herstøð. Burturflytararnir vóru átta í tali. Tveir teirra doyðu í skotbardaga við ísraelsku hermenninar, men tað eydnaðist hinum at taka Gilad Shalit við sær niður í tunnilin og til Gaza.

# Afghanski forsetin í iva



*Afghanski forsetin ivast í átakinum ímóti Taliban*

**Hamid Karzai, forseti, er ørkymlaður av, at fleiri hundrað afghanar eru falnir í einum átaki hjá teimum útlendsku hermonnunum**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Fleiri hundrað afghanar hava latið lív í einum umfatandi átaki hjá amerikanarum, kanadiumonnum og avstraliumonnum í Afghanistan tær seinastu vikurnar, men hóast teir deyðu eru úr Taliban, er Hamid Karzai, forseti, alt annað enn fegin um tað stóra mannfallið.

– Millum 500 og 500 afghanar eru deyðir tær seinastu vikurnar. Rætt er tað, at hetta eru menn í Taliban, men teir eru eisini synir Afghanistans, segði Karzai um vikuskiftið. Hann bað altjóða samfelagið endurskoða bardagan ímóti yvirgangi, tí hann kann ikki góðtaka, at bardagin skal kosta hundraðtals afghanarum lívið eftir nøkrum fáum vikum.

USA stendur fyri tí stóra átakinum, sum hevur til endamáls at gera av við Taliban har suðuri í Afghanistan. Amerikanska herleiðslan vil vera við, at einir 250 menn hjá Taliban eru falnir, síðani átakið byrjaði, men sambært afghanska forsetanum er talið nógv størri.

Ein sending í norska sjónvarpinum seinasta fríggjadag avdúkaði, at ruðuleiki valdar nógvastaðni í Afghanistan. Ein av ráðharrunum í stjórnini greiddi frá, at teir gomlu krígsharrarnir hava framvegis valdið í stórum pørtum av landinum, og at teir fáa ovurhonds nógvar pengar burtur úr rúsevnasølu. Ráðharrin segði eisini, at vápnað lið hjá krígaharrunum herja nógvastaðni, og at fólk tora ikki annað enn at líða teirra boð.

## STUTT SAGT

### Stríð um oyggjar

Stjórnin í Filipsoyggjunum hevur samtykt at útbyggja flogvøllin á Spratley-oyggjunum í Suðurkinesiska Havinum, men tað hóvar ikki hinum londunum har um vegir.

Kina, Vietnam, Malaysia, Brunei og Taiwan halda hvørt í sínum lagi uppá, at tey hava rætt til oyggjarnar, sum verða hildnar at hava bæði olju og gass í undirgrundini. Fyri fýra árum síðani skrivaðu Filipsoyggjarnar og nígggju onnur lond undir ein sáttmála um at loysa møguligar ósemjur um oyggjarnar á friðarligan hátt, og har stendur eisini, at partarnir skulu ikki taka nakað stig, sum kann ávirka støðuna. Hini londini vera við, at samtyktin hjá stjórnini í Manila um at útbyggja flogvøllin á oyggjunum er brot á sáttmálan, og tey krevja tí, at ætlanin verður slept.

Fyribils er tó einki, sum bendir á, at filipinsku myndugleikarnir ætla at slaka, men málið kann økja spenningin. Í 2002 var eisini rok um oyggjarnar, og tá skutu vietnamesar ávaringarskot eftir filipinskum hernaðarflogførum, skrivar AP.

### Hyggja heldur í sjónvarp

Hagtøl hjá amerikonsku tjóðarlundunum vísa, at tey vitjandi eru fækkað í tali tey seinastu 20 árini, og granskarar halda orsøkina vera, at tað yngra ættarliðið hevur betri hug at hyggja í sjónvarpið heldur enn at hyggja at náttúruni.

Frá seinna heimsbardaga og til 1987 vaks talið á teimum, sum vitjaðu tjóðarlundirnar, men so kom vend í, og granskararnir siga, at skiftið hendi um somu tíð, sum tey ungu fingu atgongd til sjónvarpsspøl, video, DVD, teldur og alnótina. Ein onnur orsøk til tann minkandi áhugan halda granskararnir vera, at bensinið er vorðið so dýrt í USA, at fólk aftra seg við at koyra til tær ofta fjarløgdu tjóðarlundirnar.

Amerikanski umhvørvisfelagsskapurin The Nature Conservancy harmast gongdina. Ein talsmaður hjá felagsskapinum sigur við AP, at tey ungu missa sambandið við náttúruna og tað tilknýtið, sum náttúran hevur við gerandisdagin.

### Væl kendur heiðursdoktari

Leygardagin varð tann heimskendi enski náttúrumaðurin David Attenborough tilnevndur heiðursdoktari við lærda háskúlan í Reykjavík, Háskóla Íslands.

David Attenborough er føddur í London 8. mai í 1926 og hevur sostatt nýliga fylt 80. Hann fekk sær útbúgving innan náttúrufrøði á lærda háskúlanum í Cambridge og fekk rættiliga skjótt starv hjá BBC. Har hevur hann gjørt ikki færri enn 20 røðir við sendingum úr náttúruni í øllum heimspørtum og øllum heimshøvunum, og hann hevur eisini skrivað 21 bøkur við ymsum evnum úr náttúruni.

David Attenborough hevur langt síðani fingið aðalsheiti frá Elizabeth drotning, so hann kann nýta tilnevnið Sir. Tey seinastu 20 árini hevur hann verið virkin í orðaskiftinum um at verja náttúruna. Eitt nú er hann heitur talsmaður fyri at verja frumskógin, eins og hann stryðjar tey, ið royna at verja hótt djórasløg.

### Stjala nógvar bátar

Norska løgreglan tók nú um dagarnar nakrar menn, sum høvdu verið í Agder og stolið fýra stuttleikabátar. Sambært løgregluni høvdu eigararnir goldið góðar tvær milliónir krónur fyri bátarnar.

Bátastuldur er rættiliga vanligur í Noregi. Hagtølini hjá løgregluni vísa, at í fjør vórðu 2.500 bátar stolnir, og hóast tað ljóðar av nógvum, so var talið minni enn árið fyri. Hinvegin vísir tað seg, at tjóvarnir eru farnir at leggja seg eftir at stjala teir dýru bátarnar, og í fjør rindaðu tryggingarfeløgini næstan 73 milliónir krónur í endurgjaldi fyri stolnar bátar, sum ikki komu afturíaftur, skrivar Aftenposten.

Løgreglan heldur, at færri bátar verða stolnir nú, tí eigararnir hava fingið betri møguleikar at verja teir ímóti stuldri. Eitt nú ber til at hava eina skipan, sum ger, at eigarin fær boð í fartelefonini, um bátur hansara loysir frá landi. Harafturat eru eigararnir vorðnir raskari at skráseta sínar bátar. Vantandi skráseting hevur ofta havt við sær, at stolnir bátar koma ikki afturíaftur.